DAGSINS MEINING

Torg í Vágsbotni

Nú nakað røkist fyri, at tað verður reinligari og nossligari í Vágsbotni, eiga vit at seta spurningin: kunnu vit ikki fáa meira burtur úr hesum vakra og søguliga plássi. Tað hevur jú eina søgu meira enn nakað annað pláss í landinum. Her verður hugsað um pakkhúsini og handilin sum fór fram har fyri mongum hundrað árum síðani. Ja tað osar av søgu í hesum økinum, og tað bera eisini gomlu, vøkru og sermerktu bygningarnir boð um. Spurningurin er bara, hvussu vit kunnu fáa meira burtur úr Vágsbotni, uttan at skemma plássið.

Her andar lív og gleði – forvitni og spenningur - tá bátar koma inn við fiski ella fugli. Ella tá stuttleikabátarnir leggja at eftir langa ferð um høv og bera boð um sól og summar. Her finna vit eisini Undirhúsið við tess serstøku atmosferu. Og soleiðis kundi tú hildið fram. Men hví ikki troyta møguleikarnar her liggja. Hví ikki læra av øðrum, sum eitt nú myndugleikunum í Bergen og Stavanger. Har vit finna fiska- og sølutorg niðri í søguligu havnaumhvørvunum við tess vøkru og gomlu bygningum! Hví hugsa okkara lokalu myndugleikar ikki um slíkt.

Hevði tað ikki verið eitt frálíkt hugskot at skipað eitt sølutorg av onkrum slag. Har fiskimenn, fuglaveiðumenn og fólk, sum eru komin til býin at selja epli, gularøtur, kál og aðrar góðar vørur høvdu eitt fast stað at fara. Hetta kundi so verið partur av umhvørvinum rundan um vøkru og søguligu standmyndina av Nólsoyar Pálli.

Jú tað er bara at brúka hugflogið og tengja tað saman við møguleikunum, ið liggja fyri føturnar av okkum. Hetta er so eisini nakað, sum hevði gagnað ferðavinnuni, sum jú eisini er ein týðandi partur av Vágsbotni. So eitt veruligt torg í Vágsbotni hevði kunnað nøktað mangan góðan tørv hjá teimum, sum veiða fisk og fugl, hjá teimum, sum dyrka jørðina og hjá øllum øðrum, sum vilja hava frískar matvørur, og bara hjá teimum, sum vilja hitta fólk. Slíkir tankar fostrast eitt nú í nátatíðina, tá fólk standa í bíðirøð fyri at keypa henda forkunnuga bita av føroyaleiðini. So er hetta hugskotið kastað út til onnur, sum stýra og vara av, at taka til sín. Livst so spyrst.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Eru Føroyar veruliga at samanbera við eina banarepublikk við »revolvarapolitikki«? – Ella er vón fyri framman???

Johan Dahl
Løgtingsmaður

Tað er ikki sørt ræðandi at hugsað um hvussu okkara land verður stýrt av sitandi samgongu.

Teir og tey sum tilbiðja "fullveldi fyri einhvønn prís" mugu ivaleyst eftirhondini eisini ásanna, at trøini ikki vaksa inn í himmalin og hóast tey mugu síggja í eyguni ,at samfelagið Føroyar neyvan verður eitt betri samfelag at livað í undir einum fullveldisstýri enn tað er í dag í ríkisfelagsskapinum, so fara tey neyvan at viðganga tað.

Vit eru nógv sum eru av aðrari hugsan enn hesir fullveldisgarpar, tíbetur.

Nú eru vit aftur í nánd av eini nýggjari figgjarlógarviðgerð, og áðrenn hendan er komin á borðið, so hoyrist allastaðni frá, at pengar mangla, ja vit tosað ivaleyst um fleiri 10 tals milliónir sum eykajáttan skal til.

Henda eykajáttanin sum skuldi leggjast fyri løgtingið í august er ikki komin enn, ivaleyst tí samgongumenn ikki tora at síggja tann barska veruleikan í eyguni, at teir hava vurdera skeivt ,heilt skeivt - enn einaferð.

Komandi figgjarlóg man ikki fara at verða minni "kreativ" enn tann verandi. Áhugavert verður at síggja hvussu teir ætla at kabalin skal ganga upp hesaferð.

Føroya fólk verður hildið fyri tað turra spott og verður drigið runt í manesjuni sum ein annar sirkushestur og góðtakað, sum tað sær út, hesa enn eina stund, men neyvan leingi.

Fyri at koma aftur til yvirskriftina, so kom eg til at lesa eina sera rámandi oddagrein í seinastu Fregnum nr. 28 við yvirskriftini "Samgongan esjar í óhumsku".

Har sigur Sjúrður Skaale m.a. at:

- "samgongan stútt og støðugt undirgrevur virðingina fyri teirri politisku skipanini"
- "samgongan esjar av illgrunanum um korruptión og kriminalitet"
- "samgongan esjar av klandri og stríði og hatskum persónsálopum"

Víðari sigur hann, at tað m.a. er hetta sum fólk eru farin at halda er heilt náttúrligt, og tað er beinleiðis skaðiligt, tí tað eru politikararnir sum sita á ovastu rók, sum eru fyrimyndir. Tað er tað teir siga, teirra hugburður og tann atburður teir sýna, sum fólk taka til sín. Tað seyrar viðari niður gjøgnum alt samfelagið, rakar alt og dálkar og ger stóran skaða..

Hetta ásannar altso ein av spinndoktarum Tjóðveldisflokkins.

Tað er nakað um tað sum her verður sagt, og er lítið at ivast í, at sitandi samgonga ger nógv meira skaða enn gagn - og tað vilja føroyingar koma at merkja innan langa tíð á egnum kroppi.

Eg vóni tó ikki at fólkið tekur alt ov nógv til sín av tí, sum hendan samgongan sýnir av hugburði og atburði, tí fyrimyndarlig er hon so langt frá, og verður illa statt í hesum landið framyvir um teirra leistur verður fyrimyndin.

Ikki tí eg eri "Fregnir fan" , men eg vil heita á Dimmu og Sosialin at endurprentað greinina, tí tað sær út til, at sjálvt hesin nr. 1 ella 2 spinndoktari hevur sað hvussu stórum trupulleikum teir eru í innanhýsis.

Hesin trupulleiki endar so eisini við at verða trupulleiki Føroya Fólks , tí ein ikki virkandi samgonga er verri enn ongin samgonga og nógv verri enn "sovandi andstøða " sum vónandi kemur úr dvalanum sum bjørnin og byrjar at gera um seg ongantíð ov skjótt.

Fullveldis — fatamorganaðin hevur í skjótt 7 ár og uml. 50 mió krónur í fullveldis-propaganda (forbrúki av almennum peningi), verið við til at skapað øsing, eitt medie show av dimensiónum, væl stuðla dagliga , av sera ókritiskum útvarps-, sjónvarps- og blaðmonnum/kvinnum.

Politikkurin hevur verið ringur at fáa eyga á, - har hevur ongin politikkur verið og er heldur ikki.

Har er einans klandur, og brigsl og lítið at skrivað heim um — revolvarapolitikkur tá hann er bestur. Tað er tað vit síggja dag og dagliga.

Um hesir flokkar høvdu rygg, og í verkið sýndu at politikkur tað er eisini at torað, so høvdu teir latið føroyingar sloppið at avgjørt, hvørt teir vildu havt fullveldi ella ikki, ongantíð ov skjótt við eini fólkaatkvøðu.

Tað er einasta leiðin at fáa frið í politisku skipanina og tær møguligu breiðu semjurnar, sum verða neyðugar eftir eina slíka fólkaatkvøðu.

Lat okkum fáa fólksins vilja á borðið og so leggja framtíðina hjá øllum føroyingum til rættis hareftir.

Politikkur er sum sagt eisini at torað - vit torað !! Torað tit í samgonguni ??? Eg ivist stórliga.

VARPIÐ
Skráir og ummælir Hvønn fríggjadag
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Flutningsstuðulsskipanin - ein bjarnatænasta

Kristina Háfoss
Løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin

Avtøka av flutningsstuðulsskipanini og í staðin lækka flutningskostnaðin við skipum hjá Strandfaraskipum Landsins. Hetta hevði verið ein munandi betur loysn fyri vinnulívið í útjaðaranum, og hevði framt veruliga økismenning. Hetta hevur verið vist á og úrslitið er, at fyrst Henrik Old, og síðan Finnleif Guttesen, hava lagt undirritaðu undir at vilja útjaðaranum ilt. Hetta má verða ein missskiljing, tí veruleikin er júst tann øvugti.

Beinleiðis rakstarstuðul
Flutningsstuðulin varð upprunaliga latin fyri at javnstilla fiskaframleiðarar í útjaðaranum við fiskaframleiðarar í meginøkinum. Kravið um at 30% av landaða fiskinum skal fara um uppboðssølu, og havandi í huga, at uppboðssølur ikki vóru runt alt landið, varð ynskiligt at geva flutningsstuðul fyri at javnstilla keyparar runt landið. Seinni er lógin tó broytt fleiri ferðir, og letur skipanin nú eisini stuðul til flutning frá landingarstaði og -miðstøð - um selt verður umvegis uppboðssølu.

Stuðulin verður latin í oyrum pr. kg., og er soleiðis ein beinleiðis rakstarstudningur.

Kravið fyri at fáa flutningsstuðul er, at firðir ella sund skilja landingarstað og keypara/framleiðsluvirkið, og kunnu í dag øll virkir, ið flyta feskan fisk ella feskar fiskavørur um firðir og sund, fáa stuðul úr skipanini - uttan mun til, um hesi eru í útjaðaranum ella í meginøkinum. Tí er talan um stuðul til virkir í meginøkinum, eins væl og í útjaðaranum.

Økismenning - ella økistálman ?
Skipanin er kappingaravlagandi, tí hon letur bert stuðul til flutning av feskum fiski og feskfiskavørum, og javnstillar tí als ikki kappingina í føroysku fiskivinnuni. Eisini stimbrar hon ikki áhugan at økja um kappingarførið. Harumframt elvir skipanin til, at framleiðla ta vøru, ið verður nevnd í lógini um flutningsstuðul, hóast tað kann verða, at framleiðsla av aðrari vøru hevði givið størri avkast til fyritøkuna, økið og samfelagið. Tí er við skipanini ikki talan um økismenning - kanska heldur tvørturímóti.

Stuðul, ið er kappingaravlagandi og tálmar virðisøking

Dømi um avlagandi ávirkan av flutningsstuðulsskipanini er, at virkir, ið framleiða fesk fiskafløk fáa stuðul bæði tá umræður at flyta feska fiskin til virkið, og tá umræður at flyta lidnu vøruna til eina avskipingarhavn. Hinvegin fáa eitt nú virkir, ið framleiða frysta fiskavøru ella saltfisk bert stuðul at flyta fiskin til virkið, men ikki at flyta lidnu vøruna til avskipingarhavn. Hetta er ikki bert kappingaravlagandi, men stimbrar somuleiðis uppundir ikki at meirvirka fiskin til annað enn feskfiskavøru - tí so fæst minni flutningsstuðul.

Flutningsstuðulsskipanin er eitt dømi um, at tað almenna ikki heldur seg til at skapa karmar, men blandar seg og avlagar vinnuligu framleiðsluna. Hetta er ein sera óheppin partur av skipanini, í hvørtfall um ynskt verður at stimbra fjøltáttan, meirvirkan og øktari virðisskapan í fiskivinnuni.

Lutfalsliga stórur umsitingarkostnaður
Flutningsstuðulsskipanin krevur somuleiðis umsiting hjá tí almenna, eins væl og hjá hvørji einstakari fyritøku, ið søkir um henda stuðul. Í 2000 varð latin um 3,4 mió. kr. í flutningsstuðli, og í 2003 er henda upphædd skerd til 2,5 mió. kr. - men afturat hesum kemur kostnaðurin av umsiting runt landið. Umsiting, ið óivað er stór sað í mun til veittu stuðulsupphæddina.

Stuðul helst minkað flutningsmøguleikar hjá útjaðaranum
Ein av harmiligu avleiðingunum av flutningsstuðlinum er, at skipafeløgini nú hava minni orsøk til at avskipa í útjaðaranum. Í samband við viðgerðina av lógini um flutningsstuðul í vinnunevndini í 1998 og 1999 gjørdu skipafeløgini - Eimskip og Skipafelagið Føroyar - eisini vart við, at lógin varð kappingaravlagandi og kundi elva til at skipafeløg í størri mun fóru at leggja seg eftir at avskipa frá havnum í meginøkinum - sí álit í tingmáli nr. 51/1998.

Peningaligi fyrimunurin hjá virkjum at fáa avskipað vøru úr útjaðaranum í mun til at flyta vøruna til meginøkið og avskipa hesa har, datt stórtsæð burtur tá flutningsstuðulsskipanin kom. Tí tá fekst almennur stuðul at flyta fiskavørur eitt nú við Smyrli til Havnar, fyri síðan at verða avskipað og flutt til útlandið. Skipafeløgini spara somuleiðis tíð og pening við at avskipa úr fáum havnum í meginøkinum, heldur enn eisini at leggja at í eitt nú Suðuroynni.

Heldur enn at skipafeløg rinda prísin fyri at avskipa í útjaðaranum kemur landskassin tí nú at rinda - umvegis flutningsstuðulsskipanina. Flutningsstuðulsskipanin kann tí somuleiðis síggjast sum ein óbeinleiðis stuðul til Strandfaraskip Landsins og innanlands flutningsfeløg, ið hava fingið meira virksemi.

Nevnast kann, at Skipafelagið Føroyar gavst at avskipa í Suðuroynni eftir at flutningsstuðulsskipanin kom at virka. Nógv bendir tí á, at hetta hevur samband við at flutningsstuðulsskipanin varð sett á stovn. Fyri tær fyritøkur, ið ikki fáa flutningsstuðul, tí tær ikki framleiða júst tað, ið er fest á blað í flutningsstuðulsslógini, er hetta ein eyðsædður vansi.

Avtaka flutningsstuðul - heldur bíligari flutningskostnað
Øll hava vit áhuga í, at fiskivinnan og allar aðrar vinnugreinir skulu hava góðar umstøður runt alt landið. Hesum hevur ikki minst Tjóðveldisflokkurin virkað fyri. Men henda økismenning skal sjálvsagt ikki gerast við avlagandi beinleiðis almennum studningi. Tað almenna skal hinvegin skapa góðar karmar eitt nú tá umræður gjøgnumskygt og javnbjóðis lógargrundarlag, vælferðartænastur, útbúgving og gransking v.m. - karmar, ið birta uppundir menning og betur kappingarføri.

Eisini er leikluturin hjá tí almenna at veita góðar og javnbjóðis samskiftis- og samferðslumøguleikar. Og flutningsstuðulsskipanin er ikki loysnin í hesum sambandi.

Heldur enn at lata útvaldari framleiðslu innan ávísa vinnugrein flutningsstuðul, átti alt vinnulívið í útjaðaranum at fingið betri karmar umvegis bíligari flutningskostnað við skipum hjá Strandfaraskipum Landsins. Hetta hevði framt veruliga økismenning, og hevði betrað og javnstillað kappingartreytirnar hjá vinnulívinum í útjaðaranum.

Samanumtikið má tíverri sigast, at flutningsstuðulsskipanin, ið varð ætlað at verða ein tænasta til útjaðaran - í veruleikanum er endað sum ein bjarnatænasta. Tí skal tað verða mín vón, at tað fer at eydnast at gera broytingar til frama fyri veruligari økismenning.

Smyril nærri brúkaranum

Hergeir Nielsen

Undirsjóvartunnilin kom undan kavi fyri næstan einum ári síðan, og Strandfaraskip Landsins hava nú vorið fyrstu broytingarnar til nýggju ferðaætlanina hjá sær sjálvum.

"Flogferðaætlanin við betri tænastu" kallast nýggja ætlanin, har dentur ma. verður lagdur á, at bussurin av Farstøðini kl. 9.15 røkkur flogfarinum hjá Atlantsflog kl. 11.

Hvønn morgun stendur nú bussførarin og hyggur eftir, meðan Smyril leggur rampuna niður, og við "hesi betri tænastuni" hevur hann fingið skrivlig boð um at stinga av, meðan ferðafólk koma knossandi í land.

Vit eru í ferðamannalandinum Føroyar, og lagt til rættis hava Strandfaraskip Landsins.

Tey, ið hildu, at vit nú høvdu fingið eitt upplagt samband um Suðuroyarfjørð, í bussin, undir sundið, og vestur á vøllin, hava ikki skilt ein pinn av tí heila.

Undirsjóvartunnilin og tjóðarflogfelagið kunnu ikki knýtast í tað størsta ferðamannaskipið, vit eiga.

Órógvið okkum ikki okkara sirklar, suðringar nýtast ikki Atlantsflog; flúgvið við Mærsk; - hoyra vit, teir siga.

Almenni monopolstovnurin, sum røkir flutning á sjógvi og landi, hevur tíverri ikki neyðuga førleikan fyri at fáa høvuðssambondini at hanga saman.

Á Jóansøku var tænastan undir lágmarkið, á Ólavsøku varð hon lækkað við einari helvt, og til tann seinasta altjóða fótbóltslandsdystin segði SL, at suðringar máttu keypa sær atgongumerkini fyrst, áðrenn SL tók støðu til, um teir skuldu sluppu heimaftur ella ikki.

Nú er so eitt skrivligt skjal komið, sum sigur, at úti við 10% av føroyingum verða forðaðir í at røkka sínum egna tjóðarflogfelagið.

"Flogferðaætlanin við betri tænastu" sigur ikki eitt orð um tey ferðandi við Smyrli. Klára tey tað, so er alt í lagið, men er bussurin farin, ja, so er hann bara farin.

Saman við framstigum fyri hundraðtals mió. kr. í einum nýggjum undirsjóvartunli, fáa vit suðringar soleiðis beinleiðis afturstig í tænastuni.

Her er eingin vón fyri stavn, og tíðin er komin til at taka umsitinga av Smyrli úr hondunum á teimum, ið einans hava ampa av henni.

Umsitingin av Smyrli skal liggja, har hon eigur at liggja, og tað er í Suðuroynni, har nýggi Smyril eisini fær heimstað sín.

Tíðin er komin, har tann ferðandi skal vita, at hann røkkur flogfarinum, tá ið hann keypir ferðaseðilin. Vit hava ikki ráð til at lumpa hvønn annan longur og als ikki fremmandamannin.

Fleiri einfaldir møguleikar eru, ið kunnu bøta munandi um tænastuna,

- meiri ferð á Smyril,
- serligur flutningur frá Smyrli til flogfarið,
- fráboðanarskipan umborð,
- bussurin kann støðga á,
- check inn á vøllinum kann styrkjast,
- flogfarið kann støðga á.

Helst er ein long rød av øðrum møguleikum eisini, men tíverri eingin vilji til nakað sum helst.

Á Kyndilsmessu í fjør góvu vit landsstýrismanninum eitt Kolumbusegg at arbeiða víðari við. Serfrøði hansara á tunnilsøkinum varð skúgvað til viks við uppskoti okkara um ein skjótari, betri og bíligari tunli millum Øravík og Hov. Hesin tunnil er nú á veg.

Næsta uppskot okkara verður so aftur at skúgva almenna serfrøði til viks, og flyta umsitingina av Smyrli til Suðuroyar. Tá fáa vit eina skjótari, betri og brúkiligari tænastu fyri somu pengar.

Landsstýrismaðurin kann tá frameftir vísa allari ónøgd av hesum slag frá suðuroyingum frá sær hagar, hon hoyrir heima. Til Suðuroyar.

Musikkskúlastevna verður í Havn í vikuskiftinum

TÍÐINDASKRIV

Tvær konsertir verða í Eysturskúlanum í hesum sambandi.

Virksemi í musikkskúlanum hevur hetta skúlaárið verið í gongd í ein mánaða, og orkesturstevna er longu á skránni.

Næmingar við leika á orkesturljóðføri venja allan leygardagin 27. september. Konsert verður leygarkvøldið kl 19 við strúkiorkestrum, messingkvintett, blásarum og blokkfloytum við klaverfylgispæli.

Sunnudagin 28. september er kl 15:30 verður aftur konsert, og tá framføra átta onnur blásaraorkestur tað, ið tey hava vant dagin fyri.

Summir av hesum bólkum eru virknir alt árið, men á stevnuni sleppa næmingar úr øllum landinum at vera við í hópinum.

Stevnan er lógd at vera so tíðliga í skúlaárinum so at ungu tónleikararnir kunnu koma í góða venjingarstøðu beinanvegin.

Einir 200 musikkskúlanæmingar vera við hesaferð.

Tað er ókeypis atgongd til konsertirnar í Eysturskúlanum.